Viðmerking frá fundarluttakara:

Tit ungu mugu vera positiv

Sverri Djurhuus tók orðið í salinum og takkaði fyri stevnuna, sum hann helt vera gott hugskot.

Hann segði um lívsvirði í góðum og ringum tíðum:

- Tá eg var ungur, hugsaði eg ikki so nógv um at vitja foreldrini. Eg hevði so nógv um at vera. Mamma plagdi at spyrja, hví eg ikki vitjaði oftari, men eg gav mær ikki far um tað.

- Í dag hugsi eg ofta um hetta, tí eg veit, hvussu ringt tað er hjá teimum, sum sita gomul og einsamøll.

Mentan er eisini lívsvirði

Sverri Djurhuus nevndi, at lívsvirði eisini var mentan, og tað hevði eingin tosað um við pallborðið.

Hann var vónsvikin av tí sum Eirikur Lindenskov hevði framført um framtíðarvónirnar fyri at fáa børn í Føroyum.

Hann helt at ungfólk mugu vera meira positiv, og at spámenn høvdu verið til allar tíðir, sum spáddu um mangt og hvat.

Sverri Djurhuus tók tað ikki í álvara, tá sagt varð, at eingin konufólk fóru at vera eftir í Føroyum, sum kundu eiga børn.

Annar luttakari nevndi tiltakið dagtilhald, sum nú er í fleiri kommunum, har pensionistar koma saman um dagarnar.

- Ongar reglur eru fyri, hvønn stuðul hesi tiltøk fáa, nøkur fáa stuðul til kaffi og smákøkur, meðan onnur fáa meira nágreiniliga hjálp.

- Nú verður tosað um at ung og gomul skulu koma hvørjum øðrum á møti. Her kundi verið gagnligt, um eisini tey ungu vóru saman við teimum gomlu í dagtilhaldinum.

Onnur viðmerking í salinum snúði seg um, hvussu kostnaðarmikil heilivágur er vorðin.

Økeypis heilivág

Tað var Johan Djurhuus, fyrrverandi lækni, sum nevndi, at tá hann var lækni í Vági í sínari tíð, var heilivágur økeypis!

Hann vísti á, hvussu nógv tað hevur at týða fyri gomul fólk at fáa rættan heilivág, og at tað sparir um innleggingar á sjúkrahúsinum.

Jóannes Eidesgaard svaraði við at greiða frá, hví heilivágur nú var vorðin dýrari:

- Tað er orsakað av at Sjúkrakassin nú hevur fingið ov tungar byrðar, og at hetta førdi við sær, at byrðan varð flutt á brúkaran.

Hann helt, at apoteksverkið var so mikið góð vinna, at spurningurin var, um tað var neyðugt við stórum vinningi av heilivág.

- Um kostnaður av heilivág skal broytast, er neyðugt at gera eina nýggja kunngerð, sum áleggur apoteksverkinum at nýta biligari sløg av heilivág, innan ávísar bólkar. T.v.s. at eitt slag av heilivág, ið er biligari enn tað, sum brúkarin vanliga hevur nýtt, men sum hevur somu ávirkan.

- Vil brúkarin hava tað dýra slagið, so skal hann sjálvur gjalda munin. Tað næstbesta hevði verið bert at givið ískoyti til ódýrasta heilivág.

- Tað verður neyvan veruleiki at heilivágur verður økeypis í Føroyum, men tað eru ávísir møguleikar fyri at gera okkurt munagott á heilivágsøkinum, segði Jóannes Eidesgaard.

Dagny



Myndir: Kalmar

Í stoðginum var høvi hjá fundarluttakararunum at fáa ein kaffimunn og at heilsa upp á fólk úr ymsu pensionistarfeløgunum keing landið. Vanliga hittast pensionistar til árligu veitsluna, sum Landsfelag Pensionistanna plagar at skipa fyri. Nú verður tiltakið Eldradagar møguliga eisini hvørt ár framyvir

Bjarni Vilhelm, stjóri á Almannastovuni:

Eitt starvsfólk til 1000 viðskiftafólk

- Fíggjarligir trupulleikar eru tyngjandi, eisini fyri lívsvirðið, helt Bjarni Vilhelm, stjóri á Almannastovuni, sum sat við pallborðið.

Hann greiddi fundarfólkinum frá umstøðunum hjá Almannastovuni at virka í.

- Tað hevur verið nógv tosað um, hvussu torført tað er at fáa samband við Almannastovuna.

- Vit hava í dag einar 6000 pensionistar og 2000 avlamispensionistar. Til at avgreiða hesi fólk, eru átta málsviðgerðarar á Almannastovuni. Sostatt hevur hvør málsviðgerðari 1000 viðskiftafólk. Tað er greitt, at tað ikki ger tað lættari at veita fólki eina nóg góða tænastu.

Einfaldari arbeiðsgongd

- Tað er eisini gjørt okkum greitt, at ikki fleiri fólk verða sett, og tí hevur Almannastovan roynt at bøta um tænastuna á annan hátt.

- Vit hava m.a. broytt umsóknarbløð o.a. tilfar, sum viðskiftafólk skulu útfylla og senda til okkara, sum m.a. ger tað lættari hjá tí einstaka at skilja. Eisini er innanhýsis arbeiðsgongdin broytt og gjørd serskild soleiðis, at tað skal spara um hjá málsviðgerðarnum. Tað hevur við sær, at hóast málsviðgerðarnir eru teir somu í tali, og hóast teir eisini hava fingið nógvar nýggjar arbeiðsuppgávur, so verður tað lættari hjá viðskiftafólki at fáa samband við Almannastovuna, segði Bjarni Vilhelm.

Símun Pauli Poulsen var umboð fyri pensionistarnir í pallborðinum.

Hann helt ikki, sum ofta framført á stevnuni, at tað var torført at fáa samband við yngru ættarliðini, og greiddi frá hesum viðurskiftum í Fuglafirði.

- Tað vóru tey yngru í Fuglafirði, sum m.a. arbeiddu fyri at stovna pensionistafelagið í Fuglafirði.

Hetta gjørdu tey fyri at hjálpa okkum gomlu.

Kendu okkum aftur sum sjey ára gomul

Símun Pauli Poulsen segði eisini frá samkomu, sum pensionistar herfyri vóru bodnir, saman við sjey ára gomlum børnum.

- Hetta var hugtakandi løta, og eg dylji ikki fyri, at vit gomlu kendu okkum aftur sum sjey ára gomul, hetta kvøldið.

Eirikur Lindenskov, lærari segði m.a. í sínum innleggi um tey ungu, sum arvaðu eitt væl rikið samfelag frá teimum gomlu, men sum nú noyddust at flyta av landinum í stórum tali.

Hann málbar seg myndaliga um 'kuldan frá hondum ið sleptu'.

- Ein avleiðing er, at færri kvinnur verða eftir, sum kunnu føða børn í Føroyum.

- Tað er neyðugt at planleggja upp á longri sikt, 25, 50 ja kanska 100 ár fram.

Hann nevndi ein politikara, sum fyri ikki so lagt síðani spurdi, hvar keppan var?

Ov lætt farið um

- Tað er so lætt at siga, at tey ungu eru væl fyri, fáa útbúgving og kunnu fara burtur í onnur lond at arbeiða.

- Hvussu lætt er tað at vera ungur, um tú skal rýma frá húsi og heimi, tí tað ikki er liviligt her á landi, spurdi Eirikur Lindenskov, og helt fyri, at politikarnir sjálvir fóru av landinum, tí teir gagnaðu ongum kortini.

- Vit megna ikki at gjalda skuldina aftur, og tí er mítt uppskot, at vit javnseta allar bólkar í samfelagnum, segði Eirikur Lindenskov.

- Tað nyttar lítið at vera bakklókur, og tí mugu vit bert læra av teimum mistøkum sum eru gjørd, so at søgan um 80 árini ikki endurtekur seg, segði Eirikur Lindenskov.

Dagny